## Spanskt landsliðs-met

Tá Spania í gjár vann 1-0 móti Irak í Confera-tions cup í Suðurafrika, var talan samstundis um nýtt landsliðsmet. Talan var nevnliga um 14. sigurin á rað hjá spanska fótbóltslandsliðnum, og eina slíka røð eru tað bara Brasilia, Frakland og Australia, sum hava havt. Samstundis er Spania nú bert ein dyst frá at javna metið hjá Brasilia, sum eitt skifti spældi 35 landsdystir á rað uttan at tapa.



## U15 til Aberdeen

Venjararnir fyri U15 landsliðið í fótbólti, Eli Hentze og Mathias Davidsen, hava nú úttikið 18-manshópin, ið verður við til Aberdeen International Football Festival í døgunum 19. til 27. juli. Undan fráferðini verður skipað fyri tveimum venjingarlegum, á Toftum 3. og 4. juli og í Havn 10. og 11. juli. Teir úttiknu eru hesir: Úr Víkingi: Hallgrím Gregersen og Magnus Jarnskor. Úr HB: Heri Bert Jespersen, Tór av Skarði, Róðri Rasmussen, Símun Johannesen og Jákup Hansen. Úr B68: Harald Højgaard. Úr B36: Sigurdð Poulsen og Rasmus D. Sørensen. Úr MB: Jákup Sveinbjørn Olsen. Úr VB/TB: Teitur Olsen og Ragnar Tausen. Úr NSÍ: Leivur Højgaard, Albert Johannesen og Arnold Kristiansen. Úr B71: Brandur Olsen
*Úr KÍ: Bárður Hansen*

# Nú vildi bólturin ikki inn

*07 Vestur*

*Víkingur*

**Stóri trupulleikin hjá 07 Vestur í hesum kappingarárinum hevur verið verjupart-urin. Í gjár eydnaðist tað loksins at halda málið reint, men hesa-ferð eydnaðit ikki at skjóta mál, sum teir annars hava gjørt í øllum dystunum higartil**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Piotr Krakowski, venjari hjá 07 Vestur, hevur av álvara havt nakað at hugsa um í hesum kappingar-árinum. Liðið, sum liggur niðanfyri niðurflytingar-strikuna, hevði undan dyst-inum í gjár skotið fimt flest mál í Vodafonedeildini. Men hinvegin hava teir latið langt flest mál ígjøgnum. Men hagtølini vóru so væl og virðiligi gjørd til skamm-ar í gjár.

Ikki soleiðis, at vágamenn høvdu stórvegis at frøast um eftir dystin. 07 Vestur hevði heldur ikki hesaferð vunnið á heimavølli. Men tað eydnaðist at halda málið reint. Men hinvegin eydna-ðist tað ikki at skjóta mál.

### Linligur dystur

Dysturin var eingin stór uppliving. Heimaliðið var sera ansið í verjustøðu og dúvaðu á skjótalop. Tað riggaði til tíðir væl. Vanda-mestu atsóknirnar hjá gest-unum vóru eftir deyðbólts-støður, og í fyrra hálvleiki var um reppið, at Víkingur legði seg á odda. Hans Arni Ellefsen vardi tá fyri á málstrikuni.

Víkingur legði meira fyri eftir hvíldina, og royndi at trýsta heimaliðið. Tað eydn-aðist í stórum løtum at hava bóltin spælandi á hálvuni hjá 07 Vestur, men veruliga vandamiklir vóru gestirnir sjáldan.

Mest dramatiska hend-ingin var í tíðini, sum dóm-arin hevði lagt afturat. Atli Gregersen rendi Jóhan Petur á Stongum um koll og sá beinleiðis reytt frá Ransini N. Djurhuus, dóm-ara. Ein avgerð, sum var røtt.

### Fimm stig frá

Málsetningurin fyri 2009 hjá 07 Vestur og Víkingi líkjast ikki. Uppflytararnir úr Vágum skulu fyrst og fremst varðveita sætið í deildini, og hóast liðið hevur imponerað í fleiri dystum, so sæst tað ikki aftur á stigatalvuni. Tað eru í løtuni fimm stig til bjargingina, og má liðið heilt skjótt vinna neyðugu stiginí, um tað framvegis skal vera stuttligt hjá leikar-unum at møta til venjingar.

Í gjár eydnaðist loksins at halda mótstøðuliðnum frá at skjóta mál, og eydnaðst tað eisini at fáa neyðugu málini at vinna fótbólts-dystir, sær av álvara gott út í Vágum. Tí liðið hevur sjáldan staðið uttan møgu-leika at fáa stig.

Víkingur hugsar fyrst og fremst um at vinna heiðurs-merki. Og í so máta er eitt stig á útivølli móti 07 Vestur eingin vanlukka. Men felagsliðið er í løtuni einasta liðið, sum av álvara kann bjóða HB av. Men heiðurs-merki og pláss í altjóða fótbólti komandi kapping-arár hugsa tey mest um í Leirvík og Gøtu. Og higartil er liðið á góðari leið.



*Víkingur misti týðandi fet í oddastríðnum, tá teir í gjár bert fingu málleysan javnleik við sær úr Sørvági*
*Mynd: Einslistir/Hilmar Jan Hansen*

# Bestubitar úr 3. hálvleiki

**Ein partur av sendingini, 3. hálvleikur, sum er á Rás2 eftir hvørt umfarið í Vodafone-deildini, eru SMS-boð lurtarum, har dagsins meiningar um dagsins dystir kunnu setast fram. Sendarin av besta SMS-boðnum fær hesa ferð eitt kartong av King Size Lion-Bar ísum.**

»Ættin skifti i hàlvleikinum i fuglafyri i kvøld, soleidis at tann vælkendi fiskalukturin fylti luftina. Tad toldi argjamenn ikki.«

»AB og B36 hava samanlagt 27 stig. HB hevur 29 stig«

»Nú byrjar at gløða á svangaskarið, heilt fantastiskt b68:-)«

»Hurra! Vespurnar eru utruddadar i Havn :-). HááBee«

»Eftirlysing av Svangaskari: Ein bla og svørt verja bleiv burtur tidliga fyrsta hàlvleiki. Um nakar hevur sæd hana, so vinarliga vendi tykkum til hùsid vd margàir.«

»Vøllurin í gundadalið hellur heldur nögv, í ovaru helt er 29 stig og í niðaru helvt er 13 stig:-) fekst tú tað tú vildi hava !«

»Ein fantastisk fràsøgn Tròndur, tad er gott at vit argjamenn eiga teg, nù alt annad svìkur.«

»Eg var til dyst i Vagum. Tad var sum at vikingaviðhaldsfòlkið høvdu kannad sær sigurin, adrenn tey komu vestur. Men den går ikke!!«

»EB/Streymur ì hopla, desperate housewife i hopla, Eiler Rasmussen ì hopla, men eingin stedgar B68.«